# Ferjulegan hóttir sjáldsamt taraslag

**At leggja nýggju ferjuleguna á Drelnesi har, ið ætlanir eru um, er kanska ikki tað skilabesta. Í øllum førum ikki, um ein spyr lívfrøðingar, tí á staðnum livir sjáldsamt taraslag og tí kann talan verða um brot á løgtingssamtyktir og enntá eisini konventiónsbrot og virðir fyri milliardir fara kanska fyri bakka**

LÍVFØÐI
*Dagfinn Olsen*



*Tarin við Drelnes er sjáldsamur og løgtingssamtykt frá 1993 nevnir vernd av lívfrøðiligum margfaldni. Framtíðarinntøkur fyri milliardir kunnu eisini fara fyri bakka*

*Mynd: Savnsmynd*

Talan kann gerast um einki minni enn brot á løgtingssamtykt og kanska eisini á konventiónir, um ferjulegan á Drelnesi verður løgd júst har, ið ætlanir eru um.

Á staðnum er lívfrøðiligt margfaldni og týdningarmiklast av øllum: har finst eitt sjáldsamt taraslag, ið ikki er aðrastaðni í Føroyum.

Hetta hevur fingið lívfrøðingar og onnur áhugað at rakna við.

### Brot

Vit hava vent okkum til Regin Joensen, lívfrøðing, fyri at frætta eitt sindur nærri.

Hann metir, at hóast taraslagið finst aðrastaðni í heiminum, so er talan um sjáldsaman tara og hann finst ikki aðrastaðni í Føroyum.Sostatt doyr eitt plantusamfelag út og tað er ikki í tráð við hugsanina um at verja lívfrøðiligt margfaldni.

Hann vísur á Bergkonventiónina, tó tað ikki er heilt greitt, hvørt hon er galdandi fyri Føroyar, men fast stendur tað, at løgtingið í 1993 samtykti lóg um vernd av lívfrøðiligum margfaldni.

Sostatt kann í hvussu er blíva talan um brot á løgtingssamtykt, verður ikki tarin tikin við í ætlanirnar um ferjulegu á Drelnesi.

Regin Joensen sigur, at brot á samtyktir ella konventiónir kunnu hava óhepnar avleiðingar, tí í vikuni hevur ES ákært Danmark fyri brot á umhvørvislógina og bera tey nú banga fyri avleiðingunum, tí t.d. kann ferðavinnan ávirkast og slíkt kann eisini henda hjá okkum.

Ymsar lógir, konventiónir, frágreiðingar (Oljumálaráðið; Frágr. um náttúru- og umhvørvisvernd) og altjóða avtalur eru at vísa til, men hvussu er og ikki, so stendur løgtingssamtyktin frá 1993 eftir um vernd av lívfrøðiligum margfaldni.

### Framferðarhátturin

Regin Joensen hevur eisini hug at hugleiða um arbeiðshátt og framferð. Hevur Landsverkfrøðingurin gjørt umhvørviskanning og hvat sigur hon? Hevur yvirfriðingarnevndin sæð kanningina ella frágreiðingina og bara yvirsæð hetta og er talan um konventiónsbrot. Hevur nevndin viðgjørt málið? Hvør er mannagongdin, tí ein kann skriva so mangt í eina frágreiðing, og tær enda so ofta bert í eini skuffu? Og góðkennir Heilsufrøðiliga Starvstovan frágreiðingina? Spurningarnir, ein kann seta sær, eru sera nógvir.

### Missa milliardavirðir

Umframt, at tað kann tykjast næsadjarvt at køva eitt plantusamfelag, so eru eisini stór virðir upp á spæl.

Regin Joensen nevnir bioprospektering. Hetta er, tá ein tekur kveikar úr djórum og plantum – ofta sjáldsomum – og nýtur hetta í heilivágsídnaðinum. Hetta er t.d. talan um í frumskóginum. Og hevur ein sjáldsamt plantuslag, so er ofta eisini talan um sjáldsom djórasløg.

Klassisk er søgan um ungan lesandi, sum gekk á Hardangervíddini og tók mold í eina spann. Úr hesum kom stórur ídnaður og verður hetta nýtt innan transplantatiónsviðgerð. Ein sveisisk fyritøka umsetur í dag fyri 11 milliardir árliga innan økið.

Eingin veit, hvat vit missa, men kanska eru tað eini 5-10 milliardir, ið er tað sama sum ein møgulig oljuvinna gevur. Í hvussu er missa vit framtíðar møguleikar og møgulig fríggjarlig virðir og tí mæla lívfrøðingar til, at farið verður hóvliga fram, so vit ikki verða bumbað aftur í steinøldina, sum Regin Joensen málber seg.

## Rætting

Í grein í blaðnum fyri ólavsøku um aling og ILA-sjúku, verður Bjarni Djurholm endurgivin fyri at siga, at tað kann seta okkum í ringt ljós í ES, at vit hava útflutt sjálvdeyðan fisk til ES.

Júst so avgjørdur var Bjarni Djurholm ikki í síni útsøgn, men vísti hann á, at løgreglan kannar málið, og um tað vísir seg, at hald er í skuldsetingunum, so kann hetta fáa ávirkan á ES, sum skal góðkenna koppseting av alifisiki.

– Eg havi ikki orsøk at taka so harðliga til orðanna ella at ákæra nakran, men vísti bert á, at løgreglan kannar málið, sigur landsstýrismaðurin og hesum hevur hann rætt í og biða vit hann orsaka mistakið.

**- - blðm-**

# Illgruni um eldáseting

**Sunnudagin brunnu eini hús á Bakka í Vági. Alt brann innan úr húsunum og illgruni er um eldáseting. Løgreglan í Suðuroynni tók eisini fullar bilførarar um vikuskiftið**

ELDUR
*Dagfinn Olsen*



*Sunnunáttina brunnu hesi húsini í Vági og løgreglan kannar málið, tí illgruni er um, at eldurin er ásettur*

Klokkan 15:45 seinnapartin sunnudagin fekk sløkkiliðið í Vági boð um, at eldur var í einum húsum á Bakka í Vági. Menn vóru skjótir á staðnum, men eldurin hevði fingið fastatøkur, tó at tamarhald fekst á honum. Húsini stóðu ikki at bjarga og nógvur roykur var, so teir brutu seg niður ígjøgnum takið í einum kamari, har tann stóri eldur var. Góðar 3 tímar seinni var eldurin sløktur.

### Álvarsmál

Alt er brunnið innan úr húsunum, tó at tak og útveggir standa. Talan er um hús, ið eru bygd fyrst í sjeytiárunum.

Løgreglan kannar málið og sigur, at illgruni er um, at eldurin er ásettur og verður málið viðgjørt sum slíkt.

### Fullir førarar

Hóast mangir løgreglumenn kring landið eru í Havnini til arbeiðis á ólavsøku, so eru fólk eftir á politistøðunum kring landið. Umframt eldsbruna, so hevði løgreglan í Suðuroynni ávirkaðar bilførarar at taka sær av.

Leygarnáttina rýmdi ein bilførari frá einum minni ferðsluóhappi á Tvøroyri. Tá hann stutt efir varð tikin, tók løgreglan blóðroynd av manninum.

Mánanáttina kom fráboðan um, at ein kona koyrdi ávirkað í Vági. Hon var somuleiðis tikin og blóðroynd tikin av henni. Skuldsetingar eru í báðum førum reistar um rúsdrekkakoyring.



# Teir leita eftir málinum

**U-17 dreingirnir hava megnað at givið bæði Skotlandi og Svøríki dygga mótstøðu, men trupulleikin er, at tað gongst so illa at finna vegin til meskarnar í málinum hjá mótstøðumálinum**

U-17 LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*



*U17-landsliðvenjarin, Bill Jacobsen, sigur, at árgangurin í ár er ein av teimum bestu, føroyingar hava átt, og í báðum teimum fyrstu dystunum í NM-kappingini hava føroyingar megna at givið bæði Skotlandi og Svøríki dygga mótstøðu.*

Í hesi vikuni er U-17 landsliðið í fótbólti í Hamar í Noregi, har teir luttaka í árligu NM kappingini. Føroyar eru í bólki saman við Skotlandi, Svøriki og Finnlandi, sum føroyingarnir skulu spæla ímóti í dag.

Fyrsti dysturin var ímóti Skotlandi týsdagin. Skotarnir vunnu 2-0 eftir málleyst fyrra umfar. Mikudagin var Svøríki mótstøðuliðið, og teir vunnu 3-0, eftir at hálvleiksstøðan hevði verið 2-0.

– Eg havi einki at siga til avrikið hjá okkara monnum. Teir megna fyri tað mesta at geva mótstøðumonnunum dygga mótstøðu, og tað er væl betri, enn tað var fyri nøkrum árum síðani, tá ið okkara ofta løgdu rygg til stórtap. Eg haldi, at hetta man vera ein tann besti árgangurin, sum vit hava havt. Hetta skal skiljast soleiðis, at tað ber væl til at gera nógvar útskiftingar, og at tað ikki eru tveir og tríggir, sum bara øllum liðnum. Tað er positivt, men sjálvandi er tað harmuligt, at vit ikki enn hava megnað at skora mál. Leikliga eri eg nøgdur, men úrslitaliga kundi tað havt verið betri, sigur Bill Jacobsen, venjari hjá U-17 dreingunum úr Noregi.

### Fótbóltsspælið kostaði

Ímóti Skotlandi var málleyst inntil í 52. minutti. Tá stútaði Steven Fletcher úr Hibernians innlegg úr høgru í málið. Tjúgu minuttir seinni var tað eftir innlegg og klumpaspæl, at Brian Gilmour fekk potað bóltin í málið.

– Eg haldi, at vit áttu møguleika at halda tørn um málleysan javnleik, um vit høvdu lagt okkum eftir tí. Í 1. hálvleiki vóru okkara menn frammarlaga, spældu væl og fluttu seg nógv og høvdu bóltin í minsta lagið eins nógv og mótstøðumenninir. Í 2. hálvleiki kostaði tað, at vit høvdu arbeitt so nógv í nógva hitanum. Tá vóru teir fysiskt betri fyri, meðan okkara vóru moyrir. Munurin er framvegis tann, at teir eru eitt vet skjótari, sterkari og kontantari enn okkara, sum ikki hava so nógva dystarvenjing á hesum støðinum. Men í fótbóltsspælinum standa okkara einki aftanfyri teir, sigur Bill Jacobsen.

### Deyðu bóltarnir kostaðu

Ímóti Svøríki var søgan umleið tann sama, sum hon var ímóti Skotlandi. Hesa ferð var tað gamli veikleikin í deyðbóltsstøðunum, sum gjørdi um seg. Í 18. minutti stútaði Mattias Mete eftir frísparksinnlegg úr høgru, í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat fyrra umfarinum, skoraði sami maður eftir horna, sum føroyingarnir hildu átti at havt verið málspark, og í fyrsta álopinum eftir steðgin fingu teir fínt mál eftir gott samanspæl.

– Vit vóru ongantíð niðurspældir, men vit megnaðu ikki at fáa mál, sjálvt um vit høvdu einar fimm góðar royndir ímóti málinum hjá teimum. Sjálvandi er tað ikki serliga hugaligt, at vit ikki skora, men tað fer kanska at koma ímóti Finnlandi, og plaseringsdystinum, sum verður sunnudagin, sigur Bill Jacobsen.

Finnland tapti 1-0 ímóti Svøríki og 2-0 ímóti Skotlandi. Danmark, sum Føroyar í fjør megnaðu javnleik ímóti, eigur kanska bersta liðið í ár. Teir hava vunnið 2-1 á Noregi og 3-0 á Onglandi, og teir skulu í dag spæla ímóti Íslandi, sum hevur tapt 3-0 ímóti Onglandi og 2-0 ímóti Noregi.

Føroyska liðið ímóti Skotlandi: Tróndur Kragesten, HB – Bárður Mittelstein, HB, Jóhan Davidsen, NSÍ, Borgar Kristiansen, Skála, Poul Tummas Dam, HB – Pætur Jørgensen, HB (Per Jacobsen, GÍ, 70.), Ólavur í Ólavsstovu, HB (Jóhan V. Gunnarsson, B36, 54.), Urbanus Olsen (Ásbjørn V. Gunnarsson, B36, 70.), KÍ, Christian Mouritsen, HB – Kristoffur Jacobsen liðformaður KÍ (Per Jacobsen, GÍ, 66.), Andreas Lava Olsen, LÍF (Einar Hansen, NSÍ, 78.).

Føroyska liðið ímóti Svøríki: Tróndur Kragesten, HB – Bárður Mittelstein, HB, Jóhan Davidsen, NSÍ, Borgar Kristiansen, Skála (Sam Jacobsen, GÍ, 62.), Einar Hansen, NSÍ – Ásbjørn V. Gunarsson, B36, Ólavur í Ólavsstovu, HB (Urbanus Olsen, KÍ, 50.) Jóhan V. Gunnarsson, B36, Christian Mouritsen, HB – Kristoffur Jacobsen liðformaður, KÍ (Per Jacobsen, GÍ, 66.), Andreas Lava Olsen, LÍF (Pætur Jørgensen, HB, 74.)

# Superligan vigaði føroyingar á ólavsøku

**AaB eygleiddi í finaluni Jákup á Borg, og Esbjerg fylgdi ólavsøkuaftan Hjalgrími Elttør**

YRKISSPÆLARALEIÐIN
*Jóannes Hansen*

Tað verður frá útlendskari síðu hildið eyga við føroyskum fótbóltsspælarum. Tað varð enn eina ferð staðfest á ólavsøku. Bæði ólavsøkuaftan og ólavsøkudag vóru umborð fyri donsk fótbóltsfeløg í Gundadali og hugdu at fótbóltsdystunum. Í báðum førunum var málið at finna fram til, um tað er møguleiki fyri, at føroyskir spælarar kunnu vera við til at styrkja um álopini í superliguni.

Ólavsøkuaftan var venjarin hjá Esbjerg, sum verður roknað millum bestu feløgini í superliguni í Gundadali. Hann eitur Ove Pedersen. Ørindini hjá honum vóru at sýna Hjalgrím Elttør hjá KÍ, sum ongantíð hevur fjalt yvir, at hann droymir um at royna fótbótsevnini uttanlands.

Fyrr í summar vóru umboð fyri Grindavík í bestu íslendsku deildini í Klaksvík og sóu Hjalgrím spæla, og teir góvu honum eitt tilboð um at koma til Íslands at spæla. Men Hjalgrím tók ikki av. Hann metti ikki, at avbjóðingin var serliga lokkandi.

Eftir uppgerðina ólavsøkuaftan millum HB og KÍ (dysturin endaði 3-3 og klaksvíkingar vunnu brotssparkskappingina og fingu harvið steypið norður við) man tað vera ivasamt, um Hjalgrím fer at fáa nakað tilboð frá Esbjerg – í hvussu so er ikki út frá tí, sum esbjergensarnir sóu hesa ferð.

KÍ hevði nógv fólk við í Gundadal, og Hjalgrím sat leingi á beinkinum. Tá ið hann kom á vøllin, var tað á miðvallarplássinum í vinstru og ikki í álopinum.

### AaB fylgdi Jákupi

Fleiri feløg í superliguni halda seg hava tørv á styrki í framrættaða partinum. Fíggjarliga orkan hjá donsku fótbóltsfeløgunum er ikki serliga stór, og tí verða eyguni vend hagar, sum spælarar kunnu fáast fyri lítið og lætt – í hvussu so er um sammett verður við at keypa spælarar, sum eru sáttmálabundnir aðra staðni, og har feløgini krevja stórar upphæddir fyri at sleppa teimum.

Um spælarar eru sáttmálabundnir við føroysk feløg, so hava tey rætt at krevja pengar fyri at lata spælarar fara aðra staðni, men talan sigst ikki vera um meiri, enn at tey – sammett við onnur stór feløg – so at siga verða leskaði.

Tá ið GÍ og B36 spældu steypafinalu var Poul Erik Andreasen, sum er venjari hjá AaB, millum áskoðararnar. AaB leitar eftir einum álopsspælara, sum er førur fyri at lyfta arvin eftir letiska Andres Oper, sum AaB fyrr í summar seldi til Torpedo Moskva, ið var sinnað at rinda AaB fitt av pengum fyri spælaran, sum næsta summar annars hevði verið leysur av sáttmálanum við AaB, ið harvið einki hevði havt fingið fyri hann.

Jákup á Borg var allar 120 minuttirnar á B36 liðnum. Í 1. hálvleiki var hann álopskendur miðvallari í høgru, og í pørtum av 2. hálvleiki var hann meiri álopssinnaður enn so. Jákup skoraði upp á brotsspark, og hann átti hornasparksinnleggið úr vinstru, sum John Petersen við høvdinum snittaði í málið. Men fótbóltsliga avrikið í finaluni var neyvan av tí slagnum, at venjarar í donsku superliguni við tí sum grundarlag fara at bjóða føroyskum spælarum sáttmála og løn, sum tað ber til at liva av.

Gestur Hovgaard, formaður í KÍ, sigur, at hann veit ikki um, at nakað felag á ólavsøku skuldi hyggja at Hjalgrími Elttør.

– Men tað er einki loyndarmál, at eitt nú Hjalgrím fegin vil sleppa at royna seg aðra staðni. Mín fatan er, at fleiri feløg í t. d. Danmark og Noregi fylgja spælarum hjá okkum, sigur KÍ formaðurin, sum umframt Hjalgrím nevnir eitt nú Ova Nysted og Atla Danielsen.